

Mynd: Helge Hansen/Statoil

# Statoil við í stórari ætlan í Meksikoflógvanum

**Jógvan Hugo Gardar**

31.10.2014 - 12:55

Oljan.fo

Statoil hevur tikið avgerð um at gera íløgur fyri 1,5 milliardir dollarar í Stampede-brunnin í Meksikoflógvanum. Statoil skrivar í tíðindaskrivi at ætlanin skal byrja at framleiða olju í 2018. Statoil eigur 25 prosent í Stampede, har Hess er fyristøðufelag.

Stampede er ein nýggj ætlan, har feløgini hava sligið saman fundini Knotty Head og Pony, ið liggja einar 350 kilometrar frá New Orleans í USA, og oljan liggur á meir enn 1000 metra dýpi.

Metingar siga at bunnurin goymir 350 milliónir føt av olju.